# Sílið framvegis í flokki fyri seg

**Dreingirnir hjá Havnar Róðrarfelag fingu bara kapping frá vestmenningum, sum kortini vóru eina bátslongd aftanfyri**



*Munurin var minni hesaferð, men tað var framvegis ein bátslongd frá Sílinum til næsta bátin, sum var Havfrúgvin*

**5–MANNAFØR DREINGIR**
*Jóannes Hansen*

Fjarstøðan frá Sílinum og aftur til næstu kappingarneytarnar var, sum tað eisini var talan um í fleiri av hinum kappingunum, ikki so stór, sum hon var í fyrstu FM kappingini. Men kortini var eingin ivi um, at teir umborð á Sílinum eiga bestu dreingjamanningina.

Hesa ferð vóru fleiri aðrir bátar væl við á fyrsta teininum. Tjaldrið, sum ofta plagar at standa seg væl í hesi kappingini, lá væl fyri, og tað gjørdi Fípan Fagra eisini. Sílið var ikki fremst beinanvegin, men tá ið startspurturin var gott og væl av, fekk Sílið skutin framum Havfrúnna, og harvið var tað. Tá ið teinurin var hálvrunnin, var Sílið tað mesta av einari bátslongd frammanfyri hinar bátarnar, og munurin minkaði ongantíð aftur. Heldur gekk tað hinvegin.

Kanska hevði Havfrúgvin hug til at bjóða av, tá ið teir fóru undir endaspurtin, men Sílið svaraði orduliga aftur.

Tað plagdi at vera soleiðis, at luttøkan var størst í kappingini millum dreingjabátar. Soleiðis hevur gongdin ikki verið tey seinastu árini, og heldur ikki í ár eru dreingjabátarnir so nógvir. Burtursæð frá tveimum teimum fremstu, sum tykjast skula avgera innanhýsis, hvør teirra skal vinna FM, so tykist kappingin vera stór um sekunderu plaseringarnar.

Sílið hevur vunnið báðar FM róðrarnar higartil. FM favorittarnir eru hesir: Jón Holm – Poul Rói Mohr, Hanus Winthereig, Hallur Sørensen, Regin Gaard Fossaberg, Hans Arni Bjarnason, Sigtór Lützen

### Tíðirnar

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Sílið | 05:01:07 |
| 2. | Havfrúgvin | 05:04:14 |
| 3. | Tjaldrið | 05:11:13 |
| 4. | Blikur | 05:11:14 |
| 5. | Royndin Fríða | 05:15:01 |
| 6. | Fípan Fagra | 05:15:21 |
| 7. | Kollur | 05:21:12 |
| 8. | Junkarin | 05:22:20 |
| 9. | Báran | 05:27:10 |

# Av 8. plássinum og á vinnara kós

**Fyri fyrstu ferð síðani á norðoyastevnu í fjør eydnaðist tað einum báti hjá Klaksvíkar Róðrarfelag at vinna**

**6–MANNAFØR MENN**
*Jóannes Hansen*



*Eftir stigaleysa norðoyastevnuróðurin gjørdu teir á Páll Fanga greitt, tá teir við einum øgiligum endaspurti togaðu seg fram um Smyril*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Teir hingu við nevinum eftir kappingina í heimasjógvi. Menninir umborð á Páll Fanga vórðu í ár ætlaðir at vera teir, sum skuldu verja æruna hjá klaksvíkingum. Teir endaðu á 8. plássinum í fyrstu kappingini, og harvið kundu ábendingar verið um, at nógvu fyrireikingarnar onga frukt høvdu borið, og at róðrarárið var í knúsi. Tí smakkaði sigurin á Strondum serliga væl hjá monnunum umborð á Páll Fanga.

– Eftir vónbrotið á norðoyastevnu hevði tað kanska verið freistandi at roynt at lagt venjingarnar um. Men tað gjørdu vit ikki. Vit hildu fram, soleiðis sum vit høvdu vant síðani eina ferð í vár. Vit vóru fullvísir í, at úrslitini fóru at verða væl betri, enn tað var í Klaksvík. Ta ferðina settu vit á, og vit høvdu góða rútmu. Trupulleikin var bara tann, at vit so at siga ikki komu úr stað. Umstøðurnar vóru vánaligar, og tað gekk út yvir okkum, sum tað gekk út yvir allar hinar bátarnar, sum lógu undir vestara landinum, sigur Uni Oknadal, sum er lærmaður og bátsformaður umborð á Páll Fanga.

Hesa ferð royndist betur?

– Av tí at vit høvdu staðið okkum so vánaliga í Klaksvík, so lógu vit hesa ferð ytstir á og harvið langt frá favorittunum, sum vóru í miðjuni. Vit fingu framúr góðan start. Eg haldi, at vit vóru leysir av hinum bátunum, tá ið startspurturin var liðugur. Róðursmaðurin segði okkum, at vit vóru klárt fremstir. Hinir bátarnir nærkaðust okkum, og eg havi skilt á lagnum, at útvarpið vildi vera við, at Smyril hevði tikið okkum. Men stýrimaðurin segði alla tíðina, at vit vóru fremstir. Tá ið vit fóru undir endaspurtin, segði hann okkum aftur, at vit vóru fremstir, og at tað fyrst fór at verða skotið fyri okkum. Vit hoyrdu tvey tey fyrstu skotini. Men tað var so stutt ímillum tey, at vit tordu ikki at rokna við, at vit høvdu vunnið.

Nær fingu tit tað at vita?

– Tað var, tá ið vit hoyrdu og sóu klaksvíkingarnar, sum stóðu inn á havnarlagnum, fagna okkum. Tá vistu vit, at vit høvdu vunnið, og tað var ein framúr kensla. Eftir 8. plássið á norðoyastevnu kom tað serliga væl við at vinna hesa ferð. Vit vandu aftur mánakvøldið, og tað var sera hugaligt at fara undir fyrireikingarnar til Sndalagsstevnuna. Men vit eru fullgreiðir yvir, at Smyril og eisini Jarnbardur og hinir bátarnir fara at geva okkum ein skarpan gang.

### Úr Havnini at venja

Manningin á Páll Fanga hevur roynt seg í kapproðri undanfarnu árini. Í fjør vóru tveir umborð á nýggja Klaksvíkinginum, og tríggir hava róð við Páll Fanga tvey tey undanfarnu árini, meðan ein róði við einum 8–mannafari í Havnini í fjør.

Ikki kann sigast annað, enn at hugurin er góður at venja og kappast. Í fótbólti ferðast onkrir spælarar úr Klaksvíkini og til Havnar at venja og spæla. Í kapproðri ferðast onkrir úr Havnini og norður til Klaksvíkar at venja. Tveir av mansskapinum umborð á Páll Fanga, búgva í Havnini. Í vár hava teir fýra og fimm ferðir um vikuna verið í Klaksvík og vant. Nú venja teir tríggjar ferðir um vikuna.

Roy Baldwin er stýrimaður, og rógvararnir eru frá lærinum og frameftir: Uni Oknadal, Oddur Olsen, Rógvi Nielsen, Símun Esmar Vágsá, Svenn Hansen og Símun Michael Kerlok.

Sigurin hjá Páll Fanga á Fjarðastevnuni var tann fyrsti hjá einum kappróðrarbáti úr Klaksvík síðani á norðoyastevnu í fjør, tá ið Páll Fangi við monnum eisini vann. Síðani hevur Smyril úr Vági verið mest sum einaráðandi. Leygardagin tóktist tað, sum um Smyrla menninir hildu seg hava vunnið, tá ið fyrsta skotið brast. Tað høvdu teir ikki. Eingin iva man vera um, at smiðirnir umborð á Smyrli leygardagin í Kollafirði fara at gera alt fyri at vísa, at sigurin hjá Páll Fanga síðsta leygardag bara var ein kiksari hjá vágbingum.

### Tíðirnar

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Páll Fangi | 07:22:14 |
| 2. | Smyril | 07:22:19 |
| 3. | Jarnbardur | 07:24:11 |
| 4. | Strálan | 07:25:03 |
| 5. | Lómur | 07:26:01 |
| 6. | Sundabáturin | 07:27:17 |
| 7. | Sølmundur | 07:30:12 |



# Ørvur var aftur treystastur

**Argjabáturin royndi at slíta seg framum á fyrstu metrunum, men teir megnaðu ikki at halda Ørvi**



*Hoyvíkingarnir á Ørvi vunnu aftur hesa ferð ein tryggan sigur, tó at Argjabáturin fyrsta strekkið hevði hug at muta ímóti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**8–MANNAFØR**
*Jóannes Hansen*

Argjabáturin gjørdi einki við Ørv á norðoyastevnu. Á Fjarðastevnuni var taktikkurin hjá argjamonnum greiður. Teir ætlaðu at vinna seg fram á fremsta plássið í startspurtinum, og so ætlaðu teir at stýra róðrinum, soleiðis sum tað so ofta hevur víst seg, at tann, sum liggur í oddinum, megnar hetta.

Tað eydnaðist Argjabátinum at leggja seg á odda á fyrsta teininum. Men tað eydnaðist teimum ikki at varðveita oddasessin. Kvívíkingur og Ørvur fylgdu væl við, og tá ið bátarnir fóru um túsund metra málið, var munurin frá Argjabátinum og aftur til Ørv ikki serliga stórur.

Tað tóktist sum um, at Argjabáturin hevði eitt sindur ilt við at stýra so snórabeint, og tað mundi ivaleyst taka eitt sindur frá teimum.

Ørvur var støðugur og sannførandi. Bátarnir vóru ikki komnir nógvar tíggju metrar inn um túsund metra málið, tá ið Ørvur var fremstur, og stútt og støðugt sigldi hann frá argjamonnum.

Tað kundi kanska ta einu løtuna sæð út sum um, at talan aftur hesa ferð skuldi gerast um uppvísningsróður á sama hátt, sum tað var á norðoyastevnu. Men teir á Argjabátinum vóru treiskir, og tað vóru teir á Kvívíkinginum eisini. Kvívíkingarnir fingu væl betri plasering, enn teir høvdu í Klaksvík. Tað kundi boðað frá, at Kvívíkingar fara at verða drúgvir í næstu kappingunum.

Á Argjum frættist, at teir í hesi vikuni hava gjørt onkra smávegis justering, sum teir vænta og vóna fer at stykrja um vánirnar hjá teimum at geva Ørvi uppaftur størri kapping. So alt bendir á spennandi og harða kapping í Kollafirði.

Men higartil hevur eingin gjørt nakað við Ørv. 8–mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag hevur verið rættuliga sannførandi. Á Strondum vóru teir eina bátslongd undan Argjabátinum, sum aftur var eina hálva bátslongd frammanfyri Kvívíkingin.

Manningin á Ørvi er henda: Christian Eli Zachariassen – Rúni Patursson, Heini Harryson – Hallgrím Hansen, Johnny Durhuus – Magnus Dahl Olsen, Snorri Patursson – Halgir Dahl Olsen, Bárður Brimvík

### Tíðirnar:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Ørvur | 06:59:04 |
| 2. | Argjabáturin | 07:02:09 |
| 3. | Kvívíkingur | 07:03:00 |
| 4. | Knørrur | 07:10:17 |
| 5. | Teistin | 07:23:11 |
| 6. | Toftabáturin | 07:31:07 |

# Eysturoyingurin stýrdi øllum

**Framúr starturin hevði við sær, at 10–mannafarið, sum næstan var í heimasjógvi, støðugt hevði yvirskotið, sum skuldi til at stýra allari kappingini**

**10–MANNAFØR**
*Jóannes Hansen*



*– Tað er lagt upp til eitt framúr spennandi kappingarár, halda teir umborð á Eysturoyinginum, sum hesa ferð gjørdist fremstur í 10-mannafarsróðrinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í rongini á Eysturoyingi situr í ár Sámal Hansen. Hetta er fyrsta árið, at hann situr við stýrisvølin, men hann er ikki hvør sum helst í kappróðrarhøpi. Ikki í Kappróðrarfelagnum NSÍ og ikki í føroyskum kappróðri yvirhøvur. Í NSÍ hevur hann róð í fleiri ár. Eitt nú var hann við Eysturoyinginum, sum vann FM í 1998 og í 1999. Og ikki í føroyskum kappróðri sum heild, tí hann hevur smíðað fram ímóti einari helvt av bátunum, sum eru við í FM kappingini í summar.

Leygardagin høvdu Sámal og hansara bátsfelagar greiðan taktikk, tá ið teir løgdu til fasta startin, sum var fluttur út undir Rókalandið og Saltnes, haðani frá tað skuldi rógvast og kappast inn á Hulk.

– Á norðoyastevnu ætlaðu vit at fáa besta startin. Jógvan Arge helt eisini, at vit høvdu fingið tann besta startin ta ferðina, men vit kendu okkum ongantíð hava tak á tí kappingini. Líkindini vóru ikki góð, og sjálvandi spældi tað inn á avrikið hjá okkum, at ein av manningini datt av bekkinum og niður í bátin og harvið misti eini trý tøk.

Rúni Lamhauge, sum er annar av toftimonnunum á Eysturoyingi, er bátsformaður, og hann upplivdi róðurin leygardagin soleiðis:

– Tá ið skotið varð loyst av, kendu vit beinanvegin, at hetta var okkara dagur. Tá ið vit høvdu róð einar tvey hundrað metrar, vóru vit leysir av hinum bátunum. Tá ið tað so tíðliga eydnast at koma so væl fyri, so er tað so nógv léttari, enn tað er hjá øllum hinum, at rógva teir síðstu átjan hundrað metrarnar. Sámal Hansen er rutineraður, og hann hevði yvirblikkið. Vit fingu alla tíðina boð um, hvussu vit lógu fyri, og hvat gekk fyri seg aftanfyri okkum.

Munurin styttist nakað, tá ið tit komu nærri málinum?

– Vit kendu okkum ongantíð veruliga hóttar. Vit høvdu bæði Havnarbátin og Nólsoyingin innanfyri okkum. Á síðsta teininum styttist munurin nakað. Men vit høvdu yvirskotið at seta eitt sindur eyka á, tá ið teir nærkaðust. At tað eydnaðist okkum at draga frá teimum aftur, tá ið teir løgdu upp til at taka okkum, gav okkum eyka styrki, og eg kann ætla, at tað hinvegin kendist tungt hjá teimum.

### Royndir rógvarar

Sámal Hansen er 34 ára gamalur róðursmaður umborð á Eysturoyinginum. Hinir hava allir róð í fleiri ár. Sammett við í fjør eru fýra nýggir komnir umborð, men teir hava allir roynt seg við 10–mannafarinum áður. Miðal aldurin man liggja um 25 ár. Teir flestu eru 23–26 ára gamlir. Roknað frá lærinum og frameftir eru rógvararnir hesir: Bogi Olsen, Tóroddur Vang, Rógvi Poulsen, Benny Vang, Hilmar Sam Lamhauge, Asbjørn Jacobsen, Eyðun Jensen, Lars Abrahamsen, Ludvík Justinussen og Rúni Lamhauge.

– Tað er lagt upp til eitt framúr spennandi kappingarár. Havnarbáturin vísti á norðoyastevnu, hvør dugur er í honum. Hesa ferð var Nólsoyingurin rættuliga knáur. Teir róðu ógvuliga væl, og Vestmenningurin eigur ongantíð at verða avskrivaður. Vit skulu kappast aftur longu leygardagin í Kollafirði, og vit eru rættuliga spentir.

Tað ræður nógv um startin?

– Allir kapprógvarar vita, at starturin hevur alstóran týdning. Men tað kemur meiri enn so fyri, at aðrir bátar vinna, enn teir, sum fáa besta startin. Tað snýr seg um kapping á tvey túsund metrum á Kollafirði.

### Tíðirnar:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Eysturoyingur | 09:15:03 |
| 2. | Nólsoyingurin | 09:18:02 |
| 3. | Havnarbáturin | 09:21:07 |
| 4. | Vestmenningur | 09:21:09 |